# ATLANTIC AIRWAYS




# Ársfrásøgn

## Annual Report

## 2008

www.atlantic.fo

# Innihaldsyvirlit / *Table of Contents*


Síða / *Page*

## Alment / *General*

Partafelagsupplýsingar / *Company Information* ... 2
Árið 2008 í stuttum / *The year 2008 in brief* ... 3
Fjórði ársfjórðing 2008 í stuttum / *Fourth Quarter 2008 in brief* ... 4

## Høvuðs- og lyklatøl / *Highlights and Ratios*

Rakstur / *Income Statement* ... 5
Fíggjarstøða / *Balance Sheet* ... 5
Peningastreymar / *Cash flows* ... 5
Lyklatøl / *Financial Ratios* ... 6
Partabrøv / *Shares* ... 6

## Leiðslufrágreiðing / *Management's Review*

Ársfrásøgn / *Annual Report* ... 7
Hendingar eftir árslok / *Events after the End of the Financial Year* ... 16
Útlit fyri 2009 / *Outlook for 2009* ... 17
Eigaraviðurskifti / *Ownership* ... 19
Leiðreglur fyri virkisleiðslu / *Corporate Governance* ... 20
Váðastýring / *Risk Management* ... 21
Uttanhýsis umhvørvi / *External environment* ... 22
Vitanarstøði / *Knowledge resources* ... 23
Fíggjarkalendari 2009 / *Financial Calendar 2009* ... 23

## Roknskapartøl / *Annual Accounts*

Rakstrarroknskapur / *Income Statement* ... 24
Fíggjarstøða / *Balance Sheet* ... 25
Frágreiðing um eginogn / *Statement of Changes in Equity* ... 27
Kapitalfrágreiðing / *Cash flow Statement* ... 28
Notur / *Notes* ... 29

## Átekningar / *Reports*

Leiðsluátekning / *Management Statement* ... 39
Grannskoðanarátekning / *Auditor's Report* ... 40

## Nýttur roknskaparháttur / *Accounting Principles*

Nýttur roknskaparháttur / *Accounting Principles* ... 42

## Fráboðanir til virðisbrævamarknaðin / *Stock Exchange Announcements*

Fráboðanir til virðisbrævamarknaðin / *Stock Exchange Announcements* ... 47

## Allýsingar / *Definitions*

Allýsingar / *Definitions* ... 48

# Partafelagsupplýsingar /
# *Company Information*

**P/F Atlantic Airways**
Vagar Airport
FO-380 Sørvágur
Faroe Islands
Tel + 298 34 10 00
Fax +298 34 10 01
Stovnað 1987 */Established 1987*
Skrásetingar nr. 1223 / *Reg. no. 1223*
V-tal 379778 / *VAT Number 379778*
Heimstaðarkommuna / *Domicile municipality*: Sørvágs
Heimasíða felagsins / *Website:* www.atlantic.fo
Teldupostur / *Email:* ir@atlantic.fo

**Partabræv / *Share***
Virðisbrævamarknaður / *Stock Exchange*
VMF Market on NASDAQ OMX Iceland &
NASDAQ OMX Copenhagen
Fondskota FO 0000000062 /
*ISIN code FO0000000062*
Partapeningur / *Share Capital* DKK 103,500,000
Tal av partabrøvum / *No. Of Shares* 1,035,000

**Nevnd / *Board of directors***

Christian Andreasen, formaður / *Chairman*
Eyðfinnur Jacobsen, næstformaður / *Deputy Chairman*
Petur J. Eiriksson
Verna Rasmussen
Ingi S. Joensen

**Stjórn / *Management***

Magni Arge, forstjóri / *Managing Director*
Marius Davidsen, fíggjarstjóri / *Finance Director*

**Grannskoðan / *Auditor***

**Rasmussen & Weihe**
Løggilt grannskoðanarvirki P/F /
*State Authorized Public Accountants P/F*

# Árið 2008 í stuttum

- Umsetningurin vaks úr 539 milliónum upp í 547 milliónir krónur í 2008
- Úrslitið fyri skatt gjørdist 18,6 milliónir krónur samanborið við 29 milliónir krónur í 2007
- Úrslitið eftir skatt var 15,3 milliónir krónur samanborið við 23,8 milliónir krónur í 2007
- Úrslit áðrenn fíggjarpostar, avskrivingar og skatt (EBITDA) - gjørdist 87 milliónir krónur í 2008 samanborið við 65 milliónir krónur árið fyri
- Avskrivingar vóru 60,5 milliónir krónur í 2008 sammett við 45,2 milliónir krónur í 2007
- Fíggjarútreiðslurnar vóru netto 7,8 milliónir krónur í 2008 samanborið við 9,2 milliónir krónur í netto fíggjarinntøkum í 2007
- Gjaldførið var við ársenda 82,3 milliónur krónur í mun til 38 milliónir árið fyri
- Útreiðslurnar til brennievni á rutuflúgvingini øktust 27 milliónir krónur í 2008 samanborið við árið fyri.
- Útflutningsvirðið var 48 % av umsetninginum svarandi til góðar 261 milliónir krónur.
- 277 ársverk vóru hjá felagnum í 2008. Av hesum vóru 30 ársverk leigað frá SAS
- Felagið hevur staðið fyri at útbúgva og venja umleið 80 flogfólk í 2008 m.a. í sambandi við leiguflúgving fyri SAS
- Eginognin 31. desember 2008 var 221 milliónir krónur og solvensprosentið 51%
- Flogfør og tyrlur vóru á flogi samanlagt 15.000 tímar í fjør samanborið við 11.390 tímar í 2007
- Nýtsluprosentið á rutunetinum var óbroytt samanborið við sama tíðarskeið árið fyri, 77%
- Talið av flogtímum í leiguflúgving var 7.744 samanborið við 4.167 í 2007
- Ein nýggj AW 139 tyrla kom í flotan, og ein eldri BELL 212 tyrla fór úr flotanum í 2008
- Felagið gjørdi eina sale/lease back-avtalu um eitt RJ 85 flogfar og skrivaði undir ein sáttmála um at keypa eitt Airbus 319 í 2011

# *The year 2008 in brief*

- *Total turnover for the year 2008 was DKK 547 million compared to DKK 539 million in 2007*
- *The result before tax was DKK 18.6 million compared with DKK 29 million in 2007*
- *The result after tax was DKK 15.3 million compared with DKK 23.8 million in 2007*
- *EBITDA was DKK 87 million in 2008 compared with DKK 65 million in 2007*
- *Total depreciation for 2008 was DKK 60.5 million compared with DKK 45.2 million in 2007*
- *Net financial expenditure was DKK 7.8 million in 2008 compared with a net financial income of DKK 9.2 million in 2007*
- *The cash position at year-end was DKK 82.3 million compared with DKK 38 million the previous year*
- *Fuel costs increased by DKK 27 million in 2008 compared with the previous year*
- *The export value was 48 % of turnover, corresponding to more than DKK 261 million*
- *277 full year employed worked for the company in 2008, hereof 30 full-time equivalent employees, were leased from SAS*
- *The company has been responsible for the education and training of around 80 crew during 2008*
- *As of 31 December 2008, equity was DKK 221 million, resulting in an equity ratio of 51%*
- *Aircrafts and helicopters were airborne for a total of 15,000 hours last year compared with 11,390 hours in 2007*
- *The load factor on scheduled services was the same in 2008 as in 2007 at 77%*
- *The number of airborn hours in charter/ACMI was 7,744 in compared with 4,167 in 2007*
- *A new AW 139 helicopter was added to the fleet in 2008, and an older Bell 212 helicopter left the fleet*
- *The company entered in a sale/lease back agreement for a RJ 85 aircraft, and also signed a contract for the delivery of an Airbus 319 in 2011*

## Fjórði ársfjórðingur í stuttum

- Umsetningurin fjórða ársfjórðing í 2008 var 117,9 mió. kr. samanborið við 107,2 mió. kr. fjórða ársfjórðing í 2007
- Úrslitið fyri skatt fjórða ársfjórðing var 1,7 mió. kr. samanborið við 7 mió. kr. í halli fjórða ársfjórðing í 2007
- Úrslitið eftir skatt fjórða ársfjórðing var 1,4 mió. kr. samanborið við 5,8 mió. kr. í halli sama tíðarskeiðið í fjør
- Úrslit áðrenn avskrivingar (EBITDA) fjórða ársfjórðing var 13,8 mió. kr. samanborið við 3,1 mió. kr. fjórða ársfjórðing í 2007
- Avskrivingar vóru 13,6 milliónir krónur fjórða ársfjórðing sammett við 13,4 milliónir krónur fjórða ársfjórðing í fjør
- Fíggjarútreiðslurnar vóru 1,5 mió. kr. fjórða ársfjórðing samanborið við 3,3 mió. kr. í fíggjarinntøkum somu tíð í 2007
- Flogførini flugu 3.209 tímar fjórða ársfjórðing samanborið við 2.301 tímar fjórða ársfjórðing í fjør

## *Fourth quarter in brief*

- *Revenue for the fourth quarter of 2008 was DKK 117.9 million compared to DKK 107.2 million for the fourth quarter of 2007*
- *The result before tax for the fourth quarter was DKK 1.7 million compared to a loss of DKK 7 million for the fourth quarter of 2007*
- *The result after tax for the fourth quarter was DKK 1.4 million compared to loss of DKK 5.8 million the same period last year*
- *The result before depreciation (EBITDA) for the fourth quarter was DKK 13.8 million compared to DKK 3.1 million for the fourth quarter of 2007*
- *Total depreciation for the fourth quarter of 2008 was 13.6 million compared to DKK 13.4 million in the fourth quarter last year*
- *Net financial expenditure was DKK 1.5 million in the fourth quarter compared with a net financial income of DKK 3.3 million in the fourth quarter of 2007*
- *The aircrafts were airborne for 3,209 hours in the fourth quarter compared to 2,301 in the fourth quarter last year*

# Høvuðstøl / *Financial Highlights*

## Rakstur / *Income Statement*

| (Kr. 1000) | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Nettosøla / *Net sales*** | 546.836 | 538.797 | 518.990 | 379.586 | 234.365 |
| Flúgvikostnaður / *Flight expenses* | -348.092 | -381.826 | -392.750 | -262.840 | -143.908 |
| Starvsfólkakostnaður / *Employee expenditures* | -111.775 | -91.894 | -79.711 | -57.539 | -41.551 |
| Avskrivingar / *Deprecations* | -60.513 | -45.248 | -39.586 | -34.159 | -28.201 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarligar postar / *Result before financial items*** | **26.456** | **19.829** | **6.944** | **25.048** | **20.705** |
| Fíggjarinntøkur / *Financial income* | 8.495 | 15.181 | 2.581 | 1.082 | 753 |
| Fíggjarútreiðslur / *Financial expenses* | -16.301 | -5.994 | -4.455 | -2.508 | -3.743 |
| **Úrslit áðrenn skatt / *Result before tax*** | **18.650** | **29.016** | **5.070** | **23.622** | **17.714** |
| Skattur / *Tax* | -3.336 | -5.235 | -913 | -2.888 | -3.543 |
| **Úrslit / *Profit*** | **15.314** | **23.780** | **4.157** | **20.734** | **14.171** |

## AKTIV / *ASSETS*

| (Kr. 1000) | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| Materiell støðisogn tils. / *Fixed assets* | 299.172 | 290.493 | 237.388 | 176.334 | 132.820 |
| Fíggjarlig støðisogn tils. / *Total financial assets* | 4.651 | 14.052 | 7.506 | 1.863 | 1.642 |
| **Støðisogn tils. / *Total fixed assets*** | **303.823** | **304.545** | **244.894** | **178.197** | **134.462** |
| Nýtsluvøra tils. / *Total consumables* | 973 | 1.088 | 945 | 1.252 | 1.384 |
| Áogn tils. / *Total receivables* | 51.007 | 45.890 | 97.144 | 44.264 | 26.764 |
| Tøkur peningur / *Cash and cash equivalents* | 82.362 | 37.967 | 20.670 | 40.789 | 41.992 |
| Ogn í umferð tils. / *Total current assets* | 134.342 | 84.945 | 118.759 | 86.305 | 70.141 |
| **Aktiv tils. / *Total assets*** | **438.165** | **389.489** | **363.653** | **264.502** | **204.603** |

## PASSIV / *LIABILITIES*

| (Kr. 1000) | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn tils. / *Total equity* | 221.324 | 213.677 | 195.868 | 136.880 | 126.146 |
| Avsetingar tils. / *Total provisions* | 26.585 | 23.250 | 18.059 | 16.525 | 13.637 |
| Stutt- og langfreistað skuld tils. / *Total short- and long-term debt* | 190.256 | 152.563 | 149.725 | 111.098 | 64.820 |
| **Passiv tils. / *Total liabilities*** | **438.165** | **389.489** | **363.653** | **264.502** | **204.603** |

## PENINGASTREYMAR / *CASH FLOWS*

| (Kr. 1000) | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| Netto peningastreymar frá / *Net cash flow from:* | | | | | |
| Rakstri / *Operating activities* | 83.060 | 98.234 | 71.906 | 56.580 | 35.129 |
| Íløgum / *Investing activities* | -69.192 | -98.352 | -100.640 | -77.673 | -23.578 |
| Fígging / *Financing activities* | 30.527 | 17.416 | 8.614 | 19.890 | -13.561 |
| **Ársins peningastreymar / *Cash flows for the year*** | **44.395** | **17.298** | **-20.120** | **-1.203** | **-2.010** |

# Lyklatøl / *Ratios*

| | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarlig lyklatøl / *Financial ratios*** | | | | | |
| Úrslit áðrenn avskrivingar og leasingarútreiðslur / *EBITDAR* | 96.813 | 73.131 | 50.908 | 61.373 | 48.906 |
| Úrslit áðrenn avskr. og leasingarútr. (%) / *EBITDAR margin (%)* | 18% | 14% | 10% | 16% | 21% |
| Úrslit áðrenn avskrivingar / *EBITDA* | 86.969 | 65.077 | 46.530 | 59.207 | 48.906 |
| Úrslit áðrenn rentur / *Operating profit (EBIT)* | 26.456 | 19.829 | 6.944 | 25.048 | 20.705 |
| Úrslit áðrenn skatt / *EBT* | 18.650 | 29.016 | 5.070 | 23.622 | 17.714 |
| Rakstraravkast / *Net profit ratio* | 5% | 4% | 1% | 7% | 9% |
| Ognaravkast / *Return on investments* | 6% | 5% | 2% | 9% | 10% |
| Gjaldførisevni / *Current ratio* | 31% | 22% | 33% | 33% | 34% |
| Solvensprosent / *Solvency ratio* | 51% | 55% | 54% | 52% | 62% |
| Renting av eginogn áðrenn skatt / *Return on equity before tax* | 8% | 14% | 3% | 17% | 14% |
| Renting av eginogn eftir skatt / *Return on equity after tax* | 7% | 11% | 2% | 15% | 11% |
| Vinningur pr. útreiðslukrónu / *Income/cost ratio* | 3% | 5% | 1% | 6% | 7% |
| **Hagtøl / *Statistics*** | | | | | |
| Útboð av tøkum setrakilometrum - rutuflúgving / *Capacity - scheduled flight (ASK)* | 375.552 | 360.536 | 364.220 | 324.024 | 205.976 |
| Seldir setrakilometrar - rutuflúgving / *Traffic - scheduled flight (RPK)* | 287.997 | 283.721 | 242.619 | 228.492 | 151.759 |
| Loadfaktorur / *Load factor* | 77% | 77% | 67% | 71% | 74% |
| Ferðafólkatal - ruta / *Pass. carried on scheduled* | 214.835 | 212.071 | 184.121 | 170.995 | 116.792 |
| Ferðafólkatal / *Passengers Carried* | 593.113 | 359.462 | 351.050 | 247.667 | 146.944 |
| Flogfør / *Aircrafts operated* | 7 | 7 | 5 | 5 | 3 |
| Tyrlur / *Helicopters operated* | 3 | 3 | 2 | 2 | 2 |
| Flogtímar / *Airborne hours* | 15.000 | 11.390 | 11.434 | 8.891 | 5.682 |
| Starvsfólk (ársverk) / *Number of full-time employees* | 277 | 192 | 177 | 152 | 111 |
| Inntøkur fyri hvørt starvsfólk / *Revenue per employees* | 1.974 | 2.806 | 2.932 | 2.497 | 2.111 |

# Partabrøv / *Shares*

| | 2008 | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tal av partabrøvum (1000). / *Number of shares* | 1.035 | 1.035 | 1.035 | 750 | 750 |
| Ársúrslit pr. partabræv / *Earnings after tax per share* | 15 | 23 | 4 | 28 | 19 |
| Innara virði pr. partabræv / *Book value per share* | 214 | 206 | 189 | 183 | 168 |
| Vinningsbýti pr. partabræv / *Dividend per share* | 5 | 6 | - | 13 | 3 |
| Kursur við ársenda / *Share price year-end* | 168 | 235 | - | - | - |
| Kursur við ársenda / Ársúrslit pr. partabræv / *Share price year-end / Earnings after tax per share (P/E)* | 11 | 10 | - | - | - |

Allýsingar standa á síðu 49. *A list of definitions is on page 49*

.

# Leiðslufrágreiðing / *Management's Review*

Fíggjarliga royndist árið 2008 eftir umstøðunum væl hjá Atlantic Airways. Úrslitið fyri skatt var 18,6 milliónir krónur og eftir skatt 15,3 milliónir krónur. Úti við helmingurin av inntøkunum stavar frá útlondum. Úrslitið áðrenn kursjavnan og skatt var 18,5 milliónir krónur.

Avbjóðingarnar vóru nógvar í farna ári, bæði tí felagið tók á seg stórar uppgávur og menti virksemið munandi, og tí óvæntaðar altjóða búskaparligar rembingar settu stór krøv til flogfeløg um skjótar tillagingar.

Grundraksturin royndist sera væl, og úrslitið áðrenn skatt, avskrivingar og kursjavnan (EBITDA) vaks við 34 prosentum. Hetta hendi, hóast útreiðslurnar til brennievni á rutuflúgvingini vuksu við 27 milliónum krónum í fjør, eins og útreiðslurnar í sambandi við óregluliga flúgving upp á Føroyar framvegis vóru høgar og kostaðu felagnum 13 milliónur krónur. Hækkandi rentuútreiðslur og lækkandi virði á partabrøvum, ávirkaði fíggjarinntøkurnar negativt, meðan hækkandi virði á valutatryggingum høvdu eina positiva ávirkan á fíggjarinntøkurnar.

Gjaldførið var við ársenda 82 milliónir krónur og solvensprosentið 51. Felagið hevur miðvíst styrkt um gjaldførið gjøgnum árið. Ávísar serstakar inntøkur hava verið serliga seinna hálvár, eitt nú í sambandi við søluna av einum flogfari og einari tyrlu. Sølurnar hava virkað við til at tryggja góða gjaldførið.

Tímaframleiðslan vaks úr 11.390 tímum uppí 15.000 tímar, meðan umsetningurin vaks úr 539 milliónum krónum upp í 547 milliónir krónur. Stóri vøksturin í framleiðsluni sæst ikki aftur í umsetninginum, tí meginparturin av økta virkseminum stavar frá leiguflúgving, har leigarin rindar stóran part av beinleiðis rakstrarkostnaðinum.

Felagið væntar, at støðið á virkseminum innan rutuflúgving fer at laga seg til sveiggini í føroyska búskapinum. Sum útlitini eru nú, verður talan um eina minking í ferðsluni, tí bæði føroyingar og útlendingar fara at ferðast minni. Felagið væntar eina munandi minking í leiguflúgvingini, tí nógv minni virksemi er innan hetta økið í londunum rundan um okkum. Útlitini fyri tyrlurakstrinum eru hampilig. Felagið roknar við at lata aftur tvey leigað flogfør í árinum. Somuleiðis verður starvsfólkatalið tillagað, so tað hóskar til framleiðsluna.

Felagið roknar við minni úrtøku frá grundrakstrinum, men væntar eitt positivt íkast frá fíggjarinntøkum, og roknar tí við einum úrslitið fyri 2009 á líknandi støði sum í ár. Sveiggini í ymsum pørtum av búskapinum eru kortini so ógvuslig, at sera torført er at spáa um úrslitið.

*Considering the circumstances, 2008 was a good year for Atlantic Airways in financial terms. The result before tax was DKK 18.6 million, and the result after tax was DKK 15.3 million. The majority of the company's income is from abroad. The result before market value adjustments on shares and tax was DKK 18.5 million.*

*There were numerous challenges for the company in 2008, as the company undertook large projects and also significantly expanded activity. Furthermore, international economic turmoil demanded rapid adjustment from the airline industry as a whole.*

*The company is very well pleased with its core operations, as EBITDA increased by 34%. This was in spite of an increase of DKK 27 million on fuel for scheduled serviced, as well as the costs associated with irregular operations in the Faroe Islands remaining high, costing the company DKK 13 million. Increasing interest rates and lower market value on shares, had a negative effect on the financial items, while the increase in value on forward currency contracts had a positive effect.*

*The company's cash position at year-end was DKK 82 million, and an equity ratio of 51%. The company has throughout the year worked towards strengthening its cash flow. Certain one-off income items occurred during the second half of the year, such as the sale of an aircraft and a helicopter, too. These sales have contributed to the company's healthy cash flow.*

*The total number of hours produced increased from 11,390 to 15,000 in 2008, while turnover increased from DKK 539 million to DKK 547 million. The large increase in activity is not directly evident in turnover, as the majority of the added production was in relation to charters, where the lessee is responsible for most of the direct operational cost.*

*The company anticipates that the company's level of activity will follow the trends in the Faroese economy. With the present outlook, a decrease in travel activity is expected, as both our Faroese and international customers will travel less. The company also foresees a significant reduction in charter activity in line with the reduction of charters in our neighbouring countries. The outlook for helicopter operations is fair. The company expects to return two leased aircraft during 2009, and also the number of staff will be adjusted in line with production, as there are signs for lower overall activity this coming year.*

*The company expects a lower result on core operations, and for financial items to contribute positively to the result. Overall, the result for 2009 is expected to be in line with the result from 2008. That said, the estimate is subject to uncertainties, as various sectors of the economy are experiencing severe fluctuations.*

Nevnd og stjórn gleðast um, at føroyska flogfelagið í einum ári við stórum avbjóðingum hevur staðið seg væl bæði á heimamarknaðinum og á altjóða marknaðinum. Nevndin skjýtur upp fyri aðalfundinum, at fimm milliónir krónur verða útgoldnar í vinningsbýti.

*The board and management are pleased with the fact that the Faroese airline has managed well in its home and international markets in a time of great challenges. The board proposes that a dividend of DKK 5 million is paid to shareholders.*

## Hendingar í árinum

Ongantíð áður hevur Atlantic Airways tikið upp á seg so nógvar og stórar uppgávur í einum ári sum í 2008.

Rutuflúgvingin til og úr Føroyum vaks framhaldandi fyrra partin av árinum, og rutukervið varð víðkað til eisini at umfata Stokkhólm um summarið. Ógvusligar príshækkingar á olju elvdu til stórar rakstrarligar útreiðslur, sum komu sera óvart á. Útreiðslurnar til brennievni á rutukervinum øktust við 27 milliónum krónum samanborið við árið fyri. Felagið megnaði kortini at taka ringasta broddin av óløgunum við eitt nú at tillaga túratal, prísskipan, oljuískoyti og tænastustøðið.

Oljuavgjaldið kompenseraði ikki til fulnar fyri hækkandi útreiðslum, tí tá prísurin á brennievni fór upp, var longu stórur partur av summarferðsluni seldur. Seinni í heyst fall oljuprísurin munandi, men hetta kom ikki felagnum til góðar í fullan mun, tí felagið hevði prístryggjað ein part av oljunýtsluni fram ímóti nýggjárinum við støði í prísinum, ið var galdandi undan prísfallinum.

Leiguflúgvingin vaks munandi við sáttmálum um flúgving við trimum flogførum fyri SAS úr Keypmannahavn til serliga Stavanger í Noregi og London í Bretlandi. Hesir sáttmálir settu stór krøv, tí við hesum fylgdi eisini tørvur á flogførum, flogmanningum, tekniskari manning og uppgradering av umsitingini. Samstarvið við SAS hevur roynst væl, og felagið hevur í dag ment førleikan at taka við krevjandi flutningsuppgávum fyri onnur feløg.

Tá sáttmálarnir vórðu skrivaðir við SAS, var full ferð á búskapinum. Men tíðirnar eru nógv broyttar síðan tá, og ferðslan er minkað nógv í Evropa. Ógvusliga hækkingin í oljuprísinum ávirkaði gongdina, og tá fíggjarkreppan tók dik á seg tíðliga í heyst, tóku flestu feløg stig til at minka um útboðið. Flestu feløgini minka fyrst um virksemið, sum atknýtt feløg standa fyri. Tí eru útlitini fyri at leingja ella endurnýggja ACMI-sáttmálar viknað munandi. Sáttmálarnir við SAS ganga út í apríl og mai 2009.

## *Events during the year*

*Never before has Atlantic Airways undertaken as many and as large tasks in one single year as in 2008.*

*Scheduled services to and from the Faroe Islands continued to grow during the first half of the year, and the route network was expanded to include a summer service to Stockholm. Severe price increases on fuel lead to unexpected increases in operations costs, as the fuel costs were DKK 27 million higher than the year before. The company managed, however, to negate the worst of the effects by adjusting the number of departures, adjusting the pricing system, adjusting the fuel surcharge, and the level of service offered.*

*The fuel surcharge did not fully compensate for the increased costs, since a large proportion of the summer sales had already occurred before fuel prices increased. Fuel prices reduced significantly in the autumn, but the company did not benefit in full, as the company had hedged a portion of its fuel usage for the remainder of the year based on the prices in effect before the reduction.*

*Charter activity increased significantly through agreements involving three aircraft on SAS' routes out of Copenhagen to Stavanger in Norway and London in the UK. These charters placed great demands on the company, as the agreements required high standards on the aircraft, crew, technicians, and administration. The cooperation with SAS has been very good, and now the company has attained the required capabilities to undertake demanding agreements with other companies as well.*

*At the time the agreements with SAS were signed, the economy was thriving. Much has changed since then, as travel activity all over Europe has declined. The severe fuel price increases coupled with the onset of the financial crisis in early autumn meant, that most airlines started to reduce supply. Usually the first step is to cut back on activities provided by partner airlines. As a consequence, the prospects of continuing or renewing the ACMI agreements have worsened. The current agreements with SAS expire in April and May 2009.*

Felagið stóð fyri tyrluflúgving út á boripallin hjá BP veturin 2007/08, og hetta gekk væl.

Í vár tók felagið við levering av nýggjari tyrlu, sum serliga er ætlað til frálandavinnuna. Tyrlan, ein AW 139, var í fyrsta umfari leigað út til framleiðaran Agusta Westland við støð í Milano. Felagið hevur útbúgvið flogmenn og mekanikarar til at røkja flúgvingina við AW 139 tyrluni. Í oktober varð samstarv tikið upp við Heli Holland um flúgving í frálandavinnuni úr Den Helder í Hollandi veturin 2008/09. Flúgvingin við føroyskari manning og føroyskari tyrlu úr Den Helder hevur roynst væl.

Eitt flogfar og ein tyrla vórðu seld úr flotanum í 2008. Talan var í fyrra førinum um ein sale/lease back-sáttmála. Tyrlan varð seld til Grønlands. Í báðum førum styrkti hetta væl um gjaldførið hjá felagnum.

Í januar 2008 gjørdi felagið sáttmála við Airbus um at keypa eitt nýtt flogfar av slagnum A319 til levering í 2011.

Seint í oktober varð tvey ára avtala gjørd við Vága Floghavn um rakstur av tollfríari sølu á flogvøllinum í Vágum. Avtalan umfatar sølu í komuhøllini og í frá-faringarhøllini. Avtalan kann verða longd við einum ári. Sølubúðirnar lótu upp 20. januar 2009.

Í oktober boðaði Eik Banki felagnum frá, at príssetingin av felagsins partabrøvum á virðisbræva-marknaðinum í Reykjavík fyribils var steðgað orsakað av óvissuni á íslendska marknaðinum. Seinni sama mánað varð príssetingin á virðisbrævamarknaðinum í Reykjavík uppafturtikin.

Gjørt varð av at skráseta felagið á virðisbrævamarknaðinum NASDAQ OMX í Keypmannahavn. Felagið varð skrásett í november og er sostatt dupultskrásett eins og hini børsskrásettu føroysku feløgini. Felagið stóð sjálvt fyri arbeiðinum við dupultskrásetingini, meðan Føroya Banki virkaði við til hetta. Avtala er gjørd um *market-making* á bæði íslendska og danska keypsskálanum við Eik Banka. Eitt ískoyti til prospektið dagfest 9. november 2007 varð almannakunngjørt í sambandi við skrásetingina í Keypmannahavn. Ískoytið liggur alment frammi á heimasíðu felagsins [www.atlantic.fo](http://www.atlantic.fo).

*The company was in charge of the helicopter operations to a BP operated exploration-drilling rig during the winter of 2007/2008, and this went well.*

*In the spring of 2008, the company took delivery of a new helicopter to be used mostly in offshore operations. Initially the helicopter was leased to the producer Agusta Westland based in Milano. The company has in the mean time trained crew and technicians in the operation of the AW 139 helicopter. In October, an agreement was made with Heli Holland to operate the helicopter out of Den Helder in Holland during the winter season 2008/2009 on offshore duty. The operations with Faroese crew and helicopter out of Den Helder have gone well.*

*One aircraft and one helicopter were sold during 2008. In the case of the aircraft, the sale was part of a sale/lease back agreement, while the helicopter was sold outright to Greenland. Both transactions had a positive impact on the company's cash flow.*

*In January 2008 the company contracted with Airbus for the delivery of a new A319 aircraft for delivery in 2011.*

*In late October a two-year agreement was made with the Vágar Airport Authority to operate duty-free sales in the departures and arrival lounges at the Vágar Airport, with an option to extend the agreement for a further year. The shops opened on 20 January 2009.*

*In October Eik Banki notified the company, that trading of the company's shares on the Reykjavík Stock Exchange had been temporarily suspended due to uncertainty on the Icelandic exchange. Trading resumed later that month.*

*It was decided to have the company listed on the Copenhagen NASDAQ OMX exchange. The company was listed in November, and has now, as well as the other listed Faroese companies, a dual listing. The company managed the listing, with assistance from Føroya Banki. A market-making agreement has been made with Eik Banki for the Icelandic and Danish exchanges. In connection with the listing, an addendum to the listing prospectus from 9 November 2007 was published, and is available on the company's website [www.atlantic.fo](http://www.atlantic.fo).*

## Flotin

Nevndin samtykti á heysti 2006 at endurnýggja fastveingjaða flotan í tveimum stigum. Í fyrsta lagi varð lagt upp til at skifta tey eldru BAe 146 flogførini út við tey nýggjaru Avro RJ flogførini av sama slagi. Við ársenda taldi flotin sjey flogfør. Fýra flogfør eru av slagnum Avro RJ og trý eru av slagnum BAe 146.

Felagið eigur sjálvt fýra av flogførunum, meðan trý eru leigað. Eitt av teimum leigaðu flogførunum verður latið eigaranum aftur á vári 2009, og eitt annað kann latast aftur á heysti 2009. Sostatt kann flotin lættliga minkast niður í fimm flogfør í 2009. Í oktober 2008 seldi felagið eitt Avro RJ 85 flogfar og gjørdi samstundis avtalu við keyparan um at leiga flogfarið aftur í eitt fimm ára skeið.

Í øðrum lagi varð lagt upp til, at felagið skuldi taka avgerð um, hvat flogfaraslag skal brúkast í framtíðini, tá lendingarbreytin í Vágum verður longd. Valið fall á Airbus 319, ið skal endurnýggja og effektivisera flotan við eitt nú munandi minni nýtslu av brennievni og CO2-útláti. Airbus 319 er millum mest seldu flogfør í heiminum. Sáttmáli er undirskrivaður við Airbus um levering av einum A 319 og eini optión upp á eitt flogfar afturat av sama slag. Upprunaliga var ætlanin at seta flogfarið í rakstur millum Føroyar og Danmark og á øðrum leiðum í Evropa, tá flogbreytin í Vágum væntandi er longd í 2011.

## *The Fleet*

*In the autumn of 2006, the board resolved to renew the company's fixed-wing fleet in two stages. Firstly, the newer Avro RJ aircraft of the same type would replace the older BAe 146 aircraft. At year-end 2008, the fleet consisted of 7 aircrafts: four Avro RJ and three Bae 146.*

*The company owns four of the aircrafts, while three are leased. One of the leased aircraft will be returned to the owner in the spring of 2009, and another can be returned in the autumn. Thereby the fleet can be reduced to five aircraft in 2009. The company sold and leased back on a five-year basis one Avro RJ 85 in October 2008.*

*Second, the company prepared for the future by deciding, which type of aircraft to use when the landing strip at Vágar Airport is lengthened. The Airbus 319 was chosen as the type to renew the fleet, and make the fleet more efficient in terms of fuel usage and CO2 emission. The Airbus 319 is among the most sold aircrafts in the world. A contract has been entered into with Airbus for the delivery of one aircraft, with an option for one more. The plan is to put the aircraft into service between the Faroe Islands and Denmark, as well as other European destinations, when the lengthening the landing strip is expected to be completed in 2011.*

| Flotin í dag<br>Fleet today | Tal<br>No | Ogn<br>Own | Framleiðsluár<br>Delivery year |
|---|---|---|---|
| Avro RJ 100/85 | 4 | 2 | 1993-1999 |
| BAe 146-200 | 3 | 2 | 1985-1988 |
| Bell 412 tyrlur | 2 | 2 | 1993-1997 |
| AW 139 tyrla | 1 | 1 | 2008 |

| Framtíðartilgongd /Expected delivery | |
|---|---|
| 1 Airbus A319 | 2011 |
| **Frágongd í næstum /Expected sales** | |
| Veldst um virksemi / Depending on activity | 1-3 BAe 146 |

Tyrluflotin hjá felagnum telur tríggjar tyrlur. Bulurin í tyrluflotanum telur tvær Bell 412 tyrlur. Onnur er serútgjørd til leiting og bjarging og verður mest brúkt til hetta endamál, men kann eisini nýtast til ferðafólkaflutning. Hin verður serliga brúkt til ferðafólkaflutning og frálandavinnu, men kann eisini nýtast til leiting og bjarging. Í apríl 2008 kom ein nýggj Agusta Westland AW 139 tyrla í flotan. AW 139 tyrlan telist millum tær mest framkomnu tyrlurnar yvirhøvur. AW 139 er sera væl umtókt sum bjargingartyrla og í frálandavinnuni. Tyrlan er rúmlig at arbeiða í, hevur stóra motororku og flýgur skjótt og langt. Tyrlan flytur 15 ferðafólk, men í frálandavinnuni verður sum oftast flogið við 12 fólkum í senn.

Sum liður í endurnýggjanini av flotanum varð elsta tyrla felagsins av slagnum Bell 212 seld til Air Greenland í desember 2008.

Samlaða bókaða virðið fyri flogfør og tyrlur var 228 milliónir krónur við ársenda.

*The company has three helicopters in its fleet, which is based on two Bell 412 and one AW 139 type helicopters. One of them is specially equipped for search-and-rescue, which is its primary use, but it can also be used for passenger transport. The other Bell 412 is primarily used for passenger and freight transport, but can also be used for SAR. In April 2008 a new Agusta Westland AW 139 helicopter joined the fleet. This type is one of the most advanced helicopters available, and is very suited and liked for SAR and offshore operations. The helicopter is spacious with large engine capacity; it is fast and has a long action radius. Passenger capacity is 15, but in offshore operations, the normal number of passengers is 12.*

*As part of the company's plan to renew the fleet, the company's oldest helicopter of the type Bell 212 was sold to Air Greenland in December 2008.*

*Total book value of aircraft and helicopters was DKK 228 million at year-end.*

## Ferðslan í síni heild

Flogfør og tyrlur vóru á flogi samanlagt 15.000 tímar í 2008 móti 11.390 tímum í 2007. Framleiðslan vaks sostatt 32% í 2008. Samanlagt vóru flogførini á flogi í 13.753 tímar móti 10.106 tímum í 2007. Meginparturin av vøkstrinum stavar frá leiguflúgving uttanlands. Leiguflúgving øktist úr 4.167 tímum upp í 7.744 tímar, meðan rutuflúgvingin øktist úr 5.939 tímum upp í 6.009 tímar.

Tyrlurnar vóru á flogi í 1.247 tímar í 2008, ið er 37 tímar færri enn árið fyri. Harumframt vóru bjargingartyrla og bjargingarmanningar tilbúgvin alt árið.




Størri helmingurin av framleiðsluni hjá flogførum, 56 prosent, var innan charter og aðra leiguflúgving, meðan rutuflúgving stóð fyri 44 prosentum av framleiðsluni. Árið fyri stóð rutuflúgvingin fyri 59 prosentum av framleiðsluni. Samanlagt flutti felagið við sínum flogførum og tyrlum 593.000 ferðafólk í mun til 359.000 árið fyri. Nógv tann størsti parturin av vøkstrinum í ferðafólkatalinum stavar frá leiguflúgving uttanlands.

## *Traffic Summary*

*Aircraft and helicopters were airborne for a total of 15,000 hours in 2008 compared with 11,390 hours in 2007; the increase in production was 32% in 2008. Aircrafts were airborne for a total of 13,753 hours in compared with 10,106 hours in 2007. Most of the increase was from charters abroad. Charter hours increased from 4,167 hours in 2007 to 7,744 hours in 2008, while scheduled service hours increased from 5,939 to 6,009.*

*The helicopters were airborne for 1,247 hours in 2008, which is 37 hours less than the previous year. In addition, the SAR helicopter and crew were on stand-by throughout the year.*

*The majority of the produced hours for aircraft, 56%, were in charters and similar operations, while scheduled services accounted for 44%. The previous year scheduled services accounted for 59%. Total number of passengers carried on aircraft and helicopters was 593,000 compared to 359,000 in 2007. Most of the increase stems from charters abroad.*

## Rutuflúgvingin við flogførum

Samlaða talið á ferðafólkum við rutuflogførum hjá felagnum vaks eitt lítið vet úr 212.000 upp í góð 215.000 ferðafólk. Vøksturin stavar serliga frá fyrra partinum av árinum, meðan seinastu mánaðirnir í árinum vóru merktir av fallandi ferðafólkatølum. Útboð av tøkum seturkilometrum á rutunetinum vaks við einum prosenti, meðan talið á seldum seturkilometrum øktist við 1,5 prosenti. Nýtsluprosentið á rutunetinum var óbroytt, 77 prosent, samanborið við sama tíðarskeið árið fyri.

## *Scheduled services - Aircrafts*

*Total number of passengers carried on scheduled services increased from 212,000 to just over 215,000. The increase was due to increasing passenger number during the first half of the year, while the second half saw a decline in numbers. The supply of available seat kilometres increased by 1%, while sold seat kilometres increased by 1.5%. The load factor was unchanged at 77% compared to the previous year.*

## Danmark

Á leiðunum til Danmarkar, sum umfata Keypmannahavn, Billund og Aalborg, vaks ferðafólkatalið úr 187.000 upp í 190.000, ið svarar til ein vøkstur upp á góð 2 prosent. Útboðið av fráferðum og flogsetrum var eisini 2 prosent hægri enn árið fyri. Tískil var nýtslustigið á høvuðsfarleiðunum óbroytt.

## *Denmark*

*The services to Copenhagen, Billund, and Aalborg saw an increase in passenger numbers, up from 187,000 to 190,000 in 2008, an increase of 2%. The number of departures and available seat kilometres also increased by 2%, so the load factor on the main scheduled services was unchanged.*







## Aðrar farleiðir

Talið á ferðafólkum á Íslandsleiðini í 2008 fall við umleið 8% niður á 13.350 ferðafólk. Nýtslustigið vaks kortini, tí talið á fráferðum var lækkað seinasta ársfjórðing. Ferðafólkatalið úr Íslandi er nógv minkað síðan oktober, men hinvegn er talið á ferðandi úr Føroyum til Íslands vaksið munandi. Samstarvið við Air Iceland um flúgving til Narsarsuaq í Suðurgrønlandi gekk eftir ætlan í 2008, og ætlandi verður hildið fram við hesum í 2009.

Ferðafólkatalið á farleiðunum til og í Bretlandi fall við 9 prosentum til sløk 8.400 ferðafólk. Tað var serliga farleiðin millum London Stansted og Sumburgh í Hetlandi, ið sveik. Skotska stjórnin stuðlar øllum farleiðum millum Hetland og skotskar flogvallir ella havnir gjøgnum eitt sokallað Air Discount Scheme. Beinleiðis flogferðir til eitt nú London og Føroyar eru ikki umfataðar av hesi skipan, sum ger tað munin bíligari hjá hetlendingum at flúgva til Skotlands. Farleiðin millum London og Hetland, hin longsta innanríkisfarleiðin í Bretlandi, er tí fyribils niðurløgd. Komandi summar verður framvegis flogið millum Føroyar og London, men tíðarskeiðið verður nakað styttri enn í 2008. Hetta er samstundis einasta beinleiðis ferðafólkasamband millum Føroyar og stóra grannaland okkara Bretland.

Bæði ferðafólkatal og túratal nærum tvífaldaðust á farleiðini til Noregs og Svøríkis. Útlitini eru kortini ikki góð fyri at menna flúgving til Svøríkis, nú búskaparkreppan herjar, og felagið hevur tí valt at steðga á við flúgvingini til Stokkhólm. Hinvegin heldur felagið fram at flúgva til Stavanger í Noregi, sum nú er einasta beinleiðis ferðafólkasamband við grannalandið, tí Norrøna gevst við siglingini upp á Bergen.

## *Other routes*

*The number of passengers on the Iceland route decreased by about 8% to 13,350 in 2008. Despite of this, the load factor increased, as the number of departures was decreased in the last quarter of 2008. The number of passengers from Iceland has decreased significantly, but the number of passengers from the Faroe Islands has on the other hand increased. The cooperation with Air Iceland to fly to Narsarsuaq in Greenland went as planned in 2008, and the intention is for this to continue in 2009.*

*The number of passengers to and from the UK decreased by 9% to just fewer than 8,400 in 2008. It was particularly the route between London Stansted and Sumburgh in Shetland that failed due to the Scottish Government's subsidy to all travel between Shetland and Scottish airports or seaports through the Air Discount Scheme. Direct flights to, for instance, London or the Faroe Islands are not included in the scheme, which makes it much cheaper for Shetlanders to fly to Scotland. The route between London and Shetland, the longest domestic route in the UK, has therefore been temporarily suspended. This summer the service between the Faroe Islands and London will still operate, though for a shorter season. This will be the only passenger link between the Faroe Islands and our large neighbouring country UK.*

*2008 saw a doubling in passengers and number of departures to Norway and Sweden. The economic climate is, however, not in favour of developing the Sweden route, and the company has therefore decided to stop this service. The company will continue its Stavanger route, and this will also be the only passenger link to our neighbouring country Norway, since the ferry Norrøna will stop calling at Bergen.*

## Sølu- og distributiónsskipan

Felagið skrivaði í 2008 sáttmálar um nýggja skipan til umsiting, sølu og distributión av ferðaseðlum. Higartil hevur felagið sett sítt álit á gomlu SAS-skipanina Res Aid, men hendan fer skjótt í søguna. Høvuðsveitari í nýggju skipanini verður Amadeus, sum eisini samstarvar við flestu flogfeløgini í Europa. Samstarvið við Amadeus veitir felagnum eina trygga og framkomna tænastu, sum áhaldandi verður dagførd. Umfatandi verkætlanin at flyta yvir í nýggju skipaninar byrjaði í august og verður væntandi liðugt í mai 2009. Nýggja skipanin fer eisini at gera tað møguligt hjá felagnum at bjóða viðskiftafólkunum meiri víðfevndar og framkomnar tænastur, eitt nú tá ferðingin til onnur ferðamál krevur eina kombinasjón av ferðaseðlum frá fleiri flogfeløgum.

## *Sale and distribution systems*

*In 2008, the company signed agreements for a new system for administration, sale, and distribution of tickets. The company has so far used the old SAS system Res Aid, but this system will be discontinued. The main provider of the new system will be Amadeus, which also cooperates with most European airlines. The extensive transition to the new system commenced in August, and is expected to be completed by May 2009. The new system will enable the company to provide a secure, up-to-date, and advanced service, such as booking passengers into a combination of flights from several airlines.*

## Leiguflúgving við flogførum

Virksemið felagsins innan charter og leiguflúgving vaks við 85% í 2008 í mun til árið fyri. Talið á tímum á flogið fór úr 4.167 tímum upp í 7.744 tímar. Meginparturin av hesi flúgving er fyri SAS á teirra rutuneti. Hesir sáttmálir settu stór krøv, tí við hesum fylgdi eisini tørvur á flogførum, flogmanningum, tekniskari manning og uppgradering av umsitingini. Felagið longdi tveir sáttmálar við British Aerospace um leigu av flogførum. Avtalan við SAS umfataði at leiga og útbúgva 35 flogmenn, meðan felagið sjálvt setti í starv og skipaði fyri at útbúgva útivið 50 flogternur. Í Keypmannahavn varð tekniska tænastustøðin munandi víðkað, so hon bæði kundi servisera nógv øktu flúgvingina við egnum flogførum og hjá øðrum operatørum. Samstarvið við SAS hevur gingið væl, og felagið hevur í dag ment stóran førleika at taka við krevjandi flutningsuppgávum fyri onnur feløg uttan fyri Føroyar. Sáttmálarnir um flúgving fyri SAS ganga út móti sumri, og felagið roknar tí við at minka bæði um talið á flogførum og flogmanningum.




Felagið hevur eisini nakað av aðrari leiguflúgving, eitt nú charter-flúgving fyri túroperatørar úr Danmark, eins og nakað av ad-hoc flúgvingum, men yvirhøvur er eftirspurningurin minkaður nógv seinasta hálva árið.

## *Charter operations - Aircrafts*




*The company's charter activity increased by 85% in 2008. Airborne hours increased from 4,167 in 2007 to 7,744 in 2008. Most of the charters are for SAS on their route network, which placed great demands on the company, since they require high standards in aircraft, crew, technicians and administration. The company extended two lease agreements with British Aerospace. The SAS charters meant, that the company rented and trained 35 crew from SAS, and also the company employed and trained close to 50 stewards. The technical facility in Copenhagen was upgraded to deal with the increase in servicing on own and leased aircraft. The cooperation with SAS has gone well, and the company now has the capabilities to take on other demanding charters outside the Faroe Islands. The current charters with SAS expire towards the summer of 2009, and the company therefore expects to reduce both the number of aircraft and crew.*

*The company also had some other charters, such as on behalf of tour operators from Denmark, as well as some incidental charters, but the demand for these services has greatly reduced in the second half of 2008.*

## Tyrluflúgving

Virksemið innan tyrluflúgving var á leið tað sama sum árið fyri. Tyrlurnar vóru á flogi 1.247 tímar í 2008 í mun til 1.284 tímar árið fyri.

Bell 412 tyrlur felagsins røkja SAR tænastu fyri Fiskimálaráðið/MRCC og flúgving innanoyggja fyri Strandferðsluna. Bjargingartyrla og bjargingarmanning eru á varðhaldi hvønn dag í árinum. Tyrlan varð kallað út 31 ferðir í fjør. Sáttmálin um SAR tænastu gongur út í 2010.

Fram til apríl 2008 røkti felagið flúgving fyri BP millum Vágar og boripallin, sum boraði Williams-brunnin á Føroyaleiðini. Flúgvingin og samstarvið við BP royndist væl.

Nýggja AW 139 tyrlan, sum kom í apríl, er í flúgving í frálandavinnuni í Hollandi fyri hálendska felagið Heli Holland. Wet-lease sáttmálin við hálendska felagið røkkur í fyrsta umfari fram til miðjan mars 2009.

## *Helicopter Operations*

*Helicopter operations were on the same level as in 2007. Airborne hours were 1,247 in 2008 compared to 1,284 the previous year.*

*The Bell 412 helicopters provide SAR services on behalf of the Ministry of Fishing/Maritime Rescue & Coordination Centre, as well as domestic services for Strandfaraskip Landsins. The SAR helicopter and crew are on duty every day of the year. The helicopter was on call 31 times last year. The current agreement on SAR services expires on 2010.*

*Until April 2008 the company operated the helicopter transport on behalf of BP between Vágar Airport and the drilling rig that drilled the Williams well in Faroese waters. The service and cooperation with BP went well.*

*The new AW 139 helicopter, which came into the fleet in April, is on offshore duty in Holland for the Dutch company Heli Holland. The wet-lease contract with the Dutch company is for the time being set to run until mid-March 2009.*

## Búskaparliga gongdin

Inntøkur felagsins vuksu í fjør úr 539 milliónum krónum upp í 547 milliónir. Vøksturin var góðar 8 milliónir ella 1,5 prosent.

Hóast inntøkuvøksturin ikki var stórur, var kortini talan um munandi øking í framleiðslu. Hendan stavaði serliga frá sáttmálanum við SAS, sum er ein sonevndur ACMI-sáttmáli. Í mun til vanligar charter-avtalur ber felagið ikki útreiðslur til brennievni, handling, landing og luftrúmsgjald. Tí rúgvar tílíkur sáttmáli ikki eins nógv í umsetninginum, men sæst kortini væl aftur í eitt nú starvsfólkakostnaði. Vaksandi úrslitið frá grund-rakstrinum avspeglar kortini vaksandi framleiðsluna í leiguflúgvingini. Úrslitið av grund-rakstrinum (EBITDA) var 87 milliónur krónur saman-borið við 65,1 millión krónur árið fyri.

Starvsfólkakostnaðurin øktist 20 milliónir krónur í fjør samanborið við 2007. Talið á ársverkum var 277 í 2008, ið er 85 fleiri enn undanfarna árið. Av hesum vóru 30 ársverk leigað frá SAS. Økta talið á ársverkum hevur beinleiðis samband við vøksturin í leiguflúgvingini, men starvsfólkakostnaðurin er eisini ávirkaður av hækkandi lønarstøði og útbúgving av flogfólki. Flestu starvsfólkini starvast í Føroyum, men felagið hevur eisini starvsfólk í Danmark, Noregi og Stóra Bretlandi. Størsti starvsfólkabólkur er flog-manningar.

## *Financial Statement*

*Total revenue increased last year from 539 million to DKK 547 million in 2008, an increase of DKK 8 million or 1.5%*

*Despite a modest increase in revenue, the production increase was significant. This was particularly due to the charter for SAS, which is a so-called ACMI charter. Compared to normal charter agreements, the company does not bear the cost of fuel, handling, landing, and air space fees. This is why such a charter agreement does not impact revenue very much, but instead it has more impact on staff costs. However, the increase in the result from core operations reflects the increased charter activity. EBITDA was DKK 87 million compared to DKK 65.1 million the previous year.*

*Employee costs increased by DKK 20 million compared to 2007. The number of full-time equivalent employees was 277 in 2008, which is 85 more than in 2007. Out of these, 30 full-time equivalent employees were rented from SAS. The increase in full-time equivalent employees is directly related to the increase in charter activity, but employee costs have also been affected by an increase in the general level of wages, and by training costs. Most employees work in the Faroe Islands, but the company also has employees in Denmark, Norway, and the UK. The single largest employee group is crew.*

Prísurin á brennievni var sera høgur meginpartin av farna ári. Felagið rindaði samanlagt heilar 27 milliónir krónur meira fyri brennievni til rutuflúgvingina í fjør. Hetta svarar til, at útreiðslurnar til brennievni í 2008 øktust 36 prosent samanborið við undanfarna ár.

Fleiri tiltøk eru sett í verk, sum hava økt um inntøkurnar fyri hvønn ferðandi og minkað framleiðslukostnaðin. Útboðið var tillagað, so fleiri ferðandi vóru á hvørjari fráferð, og tiltøk eru sett í verk at minka um oljunýtslu og CO2-útlát. Kostnaðurin á brennievni er fallin seinastu mánaðirnar. Tí hevur felagið lækkað oljuavgjaldið.

Tilgongdin av ognum hevur við sær øktar avskrivingar, sum eru vaksnar úr 45 upp í 60,5 milliónir krónur í 2008. Umframt tilgongd av ognum í 2008 vuksu avskrivingarnar eisini, tí stór tilgongd var í 2007. Óvanligar inntøkur frá eitt nú sølu av fogfari og tyrlu gav eitt netto íkast til raksturin uppá 3,9 milliónir krónur.

Fíggjarútreiðslurnar vóru netto 7,8 milliónir krónur sammett við 9 milliónir krónur netto í fíggjarinntøkum í 2007. Høvuðsorsøkin til munin stavar frá kurs-broytingum á partabrøvum í Atlantic Petroleum, sum í 2007 kastaðu av sær 13,8 milliónir krónur, meðan óstaðfesta kurstapið í 2008 var 5,9 milliónir krónur. Samanlagt var munurin í fíggjarinntøkum frá virðisbrøvum 19,8 milliónir krónur. Fíggjarinntøkur frá gjaldoyrum ávirkaðu hinvegin fíggjarpostarnar positivt við 6,4 milliónum krónum.

Ársúrslitið gjørdist 18,6 milliónir krónur fyri skatt og rentingin av eginognini fyri skatt gjørdist 8 prosent samanborið við 14 prosent í 2007.




## Fíggjarstøða

Felagið hevur tilvitað virkað fyri at økja um tøka peningin, tí tað verður mett skilagott í hesum tíðum við fíggjarkreppu. Tøki peningurin er øktur við 44 milliónum í árinum úr 38 milliónum upp í 82 milliónir krónur í 2008.

